Rættleiðing til lesarabrøv um »Hotel Tórshavn«



Vit, sum sita og hava tað gott á »Hotel Tórshavn«, eru ovfarin og ógvuliga vónsvikin, av at lesa summi av teim føroysku bløðunum og mótmæla, at hotellið fær so ringa umtalu. Um ein fer at ferðast í útlondum og endiliga vil búgva á »luxushotelli« við øllum teimum »facilitetum«, ein har kann krevja, fer ein ikki á Hotel Tórshavn; men sum eitt tilhaldsstað hjá føroyingum ávegis til ella av sjúkrahúsi í Danmrk (Keypmannahavn) og teirra avvarðandi, lúkar hotellið øll tey krøv, ein kundi havt hug at sett. Bæði leiðarar og starvsfólk gera tað, tey kunna, fyri at vit skulu kenna okkum væl.

Tað vantar einans tað, at vit eru ikki heima hjá okkum sjálvum. Fyristøðukvinnan syrgir sjálv fyri, at sjúklingar verða avheintaðir til »ambulanta« viðgerð til dømis. Hon tilrættaleggur allan flutning til lufthavnina, bæði fyri sjúklingin og avvarðandi. Vit undirritaðu vóna, at føroyingar, sum noyðast á sjúkrahús í Danmark, ikki aftra seg við at búgva á »Hotel Tórshavn« orsakað av hesum ljótu lesarabrøvum. Tí her er gott at vera.

Aliumsóknir!

Í Sosialinum 11. febr. skrivar fámjiningur, at umsóknin hjá P/F Guttanstøð í Fámjin bleiv krógvað dagin fyri fundin hjá Aliráðnum og kom afturíaftur dagin eftir fundin. Nú er tað, at eg kundi hugsað mær at sett formanninum í Aliráðnum nakrar spurningar:

1. Verður tað loyvt skrivara ella øðrum limi í Aliráðnum at krógva burtur umsókn hjá ávisum felag til fyrimun hjá øðrum?

2. Hví er onki gjørt við hetta, t.d. hví er tann, ið hetta hevur gjørt, ikki koyrdur úr Aliráðnum?

3. Er tað ikki tygara ábyrgd at alt gongur rættvíst fyri seg í Aliráðnum?

4. Er her ikki talan um mutur í stóran stíl?

4. Er tað ikki ein treyt, at søknarstýrið á staðnum skal geva loyvi, ðrenn Aliráðið gevur loyvi.

Til Vilhelm Johannesen, alimálaráðharra! Var ætlanin ikki tann, at alingin skuldi vera eitt alternativ til fiskivinnuna og samstundis bygdamennandi.

Her í Suðuroy eru fleiri dømi um ljótan atburð ímóti monnum, ið ætla sær undir aling og vil eg hervið biðja alimálaráðharran um at fáa hetta í rættlag skjótast gjørligt.

S.B.

Felagsskapur at standa ímóti álopum frá umhvørvisfólki!

Harra blaðstjóri.

Tann fyrsti av — óivað fleiri — umhvørvisverndarfelagsskapum hevur longu verið í Føroyum fyri at fáa okkum at steðga grindadrápi okkara. Tað kann neyvan vera ivi um, at vit eiga at taka teirra hóttanir í álvara. Eg hugsi ikki, tað nyttar okkum stórt at spæla »fornermaði« og halda, at vit ikki koma í trupulleikar, um vit ikki gera okkurt munagott tiltak á ein ella annan hátt. Hesi ungu fólkini frá EIA tykjast vera munin meir sympatisk enn hann, sum lá á Havnarvág í fjør! Eg hugsi tó, at vit ikki eiga at lata okkum lumpa av hesum, tí tá skipið hjá Green Peace, »Sirius« var her fyri nøkrum árum síðani fyri at mótmæla hvalaveiðini hjá »Hvítakletti«, søgdu tey seg heldur ikki vilja skaða okkum á nakran hátt. Grindadráp vóru tey ikki komin at mótmæla. Men sum fráleið, sóu og hoyrdu vit, at tey bert skrivaðu um — og vístu myndir frá grindadrápi!

Vit vita eisini, at tey góvu smádreingjum væl av peningi fyri at fáa teir at saksa í deyðar grindahvalir. Hetta tóku tey so myndir av og sendu um heimin allan.

Tað man neyvan vera ivi um, at fólkini frá EIA, tá tey eru heimkomin, fara at geva frágreiðingar, sum neyvan bert vera um tann »fitta føroyingin!«

Jú, vit noyðast at lurta eftir hesum fólkum, og vit noyðast at gera okkurt. Ikki tí, eg vænti ikki, at vit kunnu broyta teirra støðu, tí tey hava gjørt sær sína hugsan um grindadráp, og hesa vilja tey blíva við at hava, tí tey hava spjatt hana um allan heimin, so tað er ongin vegur aftur fyri tey, skulu tey ikki »tabe ansigt«.



At tey ikki lurta eftir okkum, prógva tey, tá tey siga, at vit lovaðu at gera okkurt munagott í 1978, men hava enn onki gjørt! Øll, sum vilja, vita, at grindalógin er broytt munandi hesi seinastu árini, og skjótt verður hon broytt enn meir. Somuleiðis er mannahugsanin um grindadráp eisini munandi broytt. Hvør er hesin felagsskapur, sum kallar seg »Environmental Investigation Agency« (EIA)? Tey siga seg umboða 25 aðrar felagsskapir.

Eg ivist.

Tað var ikki nógv at hoyra um henda felagsskap, áðrenn tey gjørdu vart við seg í Vestmanna í fjør. Eg hugsi ikki, eg fari skeivur, tá eg haldi meg minnast, at tá varð sagt, at felagsskapurin var nýstovnaður, og einastu limir í honum vóru tey trý: Allan Thornton, sum er leiðari, Jennifer Gibson, varaleiðari og so ein triði, sum eisini var við í Vestmanna. Tað hoyrdist eisini, at mótmælið í Vestmanna var fyrstu ferð, tey veruliga gjørdu vart við seg. Tey siga, at tey halda lítið um frágreiðingarnar hjá Árna Ólavssyni í útvarpinum. Sjálvandi gera tey tað!

Árni Ólavsson flokkaði teir ymisku umhvørvisbólkarnar.

M.a. segði hann, at summi av umhvørvisfólkunum als ikki ynsktu hvalaveiðina steðgaða, tí tey livdu av at mótmæla henni. Um hetta er beint, veit eg ikki, og um EIA hoyrir til henda bólkin, veit eg heldur ikki, men tað er so tað, tey fáast við, og tey hava fingið pening til hetta frá enskum rithøvundi, sum í fyrstu syftu ikki vildi lata nýskrivaðu bók sína geva út í Danmark, sum mótmæli móti føroyska grindadrápinum. Seinni læt hann tó bókina geva út har. Inntøkan av bókini skuldi fara til EIA!

Víðari siga tey bæði, Allan Thornton og Jennifer Gibson, at tey hava tosað við nógv ung fólk í Føroyum, sum ongantíð hava luttikið í grindadrápi og als onki leggja í grind. Tað kann væl vera, at so er, men eg hugsi tó, at hesi munnu vera í stórum minniluta millum ungsum eldri fólk í Føroyum.

Eitt er givið, vit noyðast at taka hesar felagsskapir í álvara, vit sleppa ikki undan. Vit eiga at taka tey í so stórum álvara, at vit meta teirra álop sum krígsatgerðir, tí tað, tey gera, er ikki bert tað, at tey taka grindina frá okkum, men tey taka alt okkara lívsgrundarlag undan okkum við teirra — í nógv flestu førum — lygusøgum.

Myndugleikarnir hava longu gjørt nógv, men ikki nokk. Skjótt má berast at, so vit ikki, sum so mangan liggja sjóvarfallið av okkum.

Tað er týðuligt, at tey bæði frá EIA hava fleiri hjálparfólk í Føroyum. Tit eiga at hugsa tykkum væl um, hvat tað er, tit gera, tí at hjálpa eina figginda í krígstíð, er landasvik!

Tað er kanska so lætt at halda við teimum nú, tí øll tekin eru til, at tey verða at vinna bardagan, tí vit eru so ómetaliga sárbær. Vit hava so at siga bert ein vinnuveg, sum ikki tolir alt ov nógv óróg. Men undir seinna heimsbardaga vóru tey nógv, sum hildu, at týskarar fóru at vinna kríggið, tí fóru tey í part við teimum móti sínum egnu, eins og tit nú gera! Vit vita tó, hvussu kríggið gekk, og hvat varð av svíkjarunum tá!

Einaferð varð tosað um at stovna ein felagsskap sum mótvekt móti álopunum frá umhvørvisfelagsskapunum. Hvat varð av hesum frálíka hugskoti?

Hesin felagsskapur nýtist ikki at vera nakar álopsfelagsskapur, men hann kann hava til uppgávu at taka ímóti teimum, sum koma hendavegin at mótmæla, og øðrum við. Tosa við tey, leiðbeina tey, gera upplýsingargreinir og -filmir, ikki bert um grindadráp, men um Føroyar og føroyingar sum heild, t.d. sagt teimum frá, hvussu vit verja fuglalív okkara o.s.fr.

Royndirnar frá »Færøerne i Focus« niðri í Keypmannahavn kundu verið grundarlag undir hesum felagsskapi.

ohe.



Útstoyt og bremsur á goymslu til flest allar bilar.

Shell Service

á Frælsinum, tlf. 1 2112

3800 Tórshavn